## Gravarhjálp

Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn
Tel 311723 - 511723 · Fax 321722
herman@post.olivant.fo

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800

# Sosialráðgevi/ Sosialformidlari
## til Barnaverndar-tænastuna í Suðuroy

Í sambandi við at kommunurnar hava yvirtikið barnaverndarøkið, er eitt fulltíðarstarv ella 2 parttíðarstørv sum sosialráðgevi/sosialformidlari í barnaverndarumsitingini i Suðuroya øki leyst at seta skjótast gjørligt.

Barnaverndarumsitingin heldur til á ráðhúsinum í Tvøroyrar Kommunu og skal fyribils virka við tveimum fólkum. Uppgávurnar verða at røkja barnaverndarmál, gomul eins og nýggj, innan fyri rammurnar í barnaverndarlógini.

**Vit vænta at tú:**
- Hevur viðkomandi útbúgving ella royndir frá arbeiði við málsviðgerð í eini almennari fyrisiting.
- At tú er fleksibul og er góð/ur at samstarva við.
- At tú er ábyrgdarfull/ur, kann arbeiða sjálvstøðugt og móti einum úrsliti.
- At tú hevur yvirblikk og ein professionellan hugburð til tey mál, tú arbeiðir við.
- At tú er nærverandi og hevur umsorgan fyri tørvinum hjá tí einstaka barninum.
- Innlit í og royndir við barnaverndararbeiði er ein fyrimunur, men ikki eitt krav.

**Vit bjóða:**
- Eitt spennandi og umskiftiligt arbeiði.
- Avgerðarheimild í størri mun.
- Møguleika fyri flekstíð og at arbeiða heimanífrá.
- Løn við útgangsstøðið í tínum førleikum og galdandi sáttmála við viðkomandi felag.

Nærri upplýsingar fáast við at venda seg til leiðaran á Barnaverndarumsitingini á tel: 371085 ella teldupost: susanne@tvoroyri.fo

Umsókn við viðkomandi prógvum verður at senda til:

**Tvøroyrar Kommuna**
Postboks 80
FO 800 Tvøroyri

**Mrk.: Starv barnaverndarumsitingin**

**Umsóknarfreist:** týsdagin tann 31. januar 2006.
Í umsóknini verður viðmerkt um ynskt verður fulltíðar- ella parttíðarstarv.

# Tvingsilssøla yvir útróðrarbát

Eftir áheitan Inga Højgaard, advokati, Advokatfelagið við Strond 4, Yviri við Strond 4, 100 Tórshavn, tlf. 311260, vegna veðhavara, verður hildin tvingsilssøla

**fríggjadagin, tann 3. februar 2006, kl. 13.30,**

á Dómaraskrivstovuni í Tórshavn, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn, (AS 2-35/2005) yvir útróðrarbátin

**"M/B Eik Helgadóttir"**

ið Sp/f H.K. undir konkurs er eigari av. Báturin hevur kenningsstavir XPMW, og havnakenningstavir FD 65.

Báturin er smíðaður úr furu, bygdur í Romsdal í Noregi í 1964 og heimahoyrandi í Fuglafriði. Báturin er merktur 19,99 brt.

Báturin verður seldur sum hann er og liggur við útgerð sum t.d. línuspæli v.m.

Fyrireikandi fundur verður hildin á Dómaraskrivstovuni **fríggjadagin, tann 27. januar 2006, kl. 13.00.**

Einhvør, ið heldur seg hava rættindi yvir bátinum ella møguligari útgerð, verður biðin um at møta.

Avrit av uppskoti til tvingsilssølutreytir kunnu fáast við at venda sær til advokat Inga Højgaard.

Skjøl í sambandi við tvingsilssøluna liggja frammi til skoðan á Dómaraskrivstovuni, C. Pløyensgøta 1, 100 Tórshavn.

Føroya fútarættur, tann 16. desember 2005

## miðlahúsið í Vágsbotni

### Autisma og visjón 2015

Almennur pallborðsfundur verður í Miðlahúsinum í Vágsbotni týskvøldið 17. januar kl 19.30 við heitinum:

**Hava fólk við autismu tað líka so gott sum tú og eg í 2015 – og hvat gera vit meðan vit bíða?**

Tey, ið luttaka á fundinum verða:

Lennart Pedersen, sálarfrøðingur og fakligur ráðgevi frá Center for Autisme í Danmark

Morten Carlsson, foreldur og formaður í Landsforeningen Autisme í Danmark

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í Almanna- og Heilsumálarráðnum

Umboð frá Mentamálaráðnum og Sernámsdeplinum

**LFA – Landsfelagið fyri fólk við autismu**

# Bakaralærlingur

Søkt verður eftir bakaralærlingi.

Lærutíðin er 4 ár, harav 35 vikur á tekniskum skúla í Danmark

Arbeiðstíðin er mest um dagin, hóast nakrar náttarvaktir eru.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at ringja til okkara og spyrja eftir Eli Andreasen.

BAKARÍIÐ P/F HJÁ GUNLEIVI

c/o Vørður
Hoyvíksvegur 65
Tlf. 598838 ella 312161

FAROE DIVE.fo
**Kavaraskúli**
**Ring/skriva og fá faldara ókeypis!**
**Tlf. 218929 ella 458939**
**www.faroedive.fo**



PADI

*Til allar kirkjuráðslimir:*

### Felagið fyri Kirkjuráðslimir skipar fyri upplýsandi fundum um kirkjuráðsarbeiðið.

| *Nær* | *Øki og stað* |
|---|---|
| **18. januar kl. 19.30** | **Norðoyggjar.** *Í kjallaranum í Christianskirkjuni* |
| **24. januar kl. 19.30** | **Norðstreymur.** *Skótahúsið í Kollafirði* |
| **25. januar kl. 19.00** | **Suðurstreymur.** *Í Vesturkirkjuni í Havn* |
| **31. januar kl. 19.00** | **Vágar.** *Í meinigheitshúsinum í Sandavági* |
| **1. februar kl. 20.00** | **Sandoy.** *Í Samljóð, Skopun* |
| **12. februar kl. 14.30** | **Suðuroy.** *Umborð á Smyrli (í Buffet hølinum)* |
| **16. februar kl. 19.30** | **Eysturoy.** *Í kirkjukjallaranum í Gøtu kirkju.* |